Tíðindablaðið sosialurin Telefon 311820 Telefax 314720 Internetadressa: www.sosialurin.fo e–mail: post@sosialurin.fo

# Veðrið



**Fimm-daga-for-søgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fyrrapartin lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Seinnapartin veksur hann vindin til hvassan vind av útsynningi og suðri og um kvøldið regn. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fyrrapartin hvassur vindur av suðri og stundum regn. Seinnapartin minni vindur av vestri og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið mánadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.



*Mynd: Jens K. Vang*

# Blástu av lívsins kreftum

*Hálvthundrað næmingar á Tórshavnar Musikskúla høvdu mikukvøldið konsert á skúlanum á Frúutrøð. Tað eru lærararnir, sum hava tikið stig til konsertina*

STEFAN Í SKORINI

Konsertin varð hildin fyri at presentera tað nýggja harmoniorkestrið á musikskúlanum. Hetta eru næmingar í aldrinum 9-15 ár, og orkestrið telur 40-50 næmingar.

Peder Riis-Jensen stendur á odda fyri orkestrinum. Hetta er annað árið, hann hevur verið lærari á musikskúlanum. Hvønn mikudag er orkestrið savnað á Frúutrøð undir leiðslu av Peder Riis-Jensen.

Fleiri lærarar á musikskúlanum hava tikið stig til at stovna eitt harmoniorkestur. Teir eru Andrea Hendriksdóttir, Katja Volovelskaja, Jacqueline Fitzgibbon, Bjarni Berg, Eirikur Skála, Brandur Øssursson, Kenneth Jones, Edvard Nyholm Debess og Steven Foggin. Orkestrið er fyri bæði træ- og messingblásarar. Eisini sleppa bassurin og slæverkið uppí part.

Hugskotið við hesum orkestrinum er sprottið í seinasta leikári, tá lærararnir tosaðu saman um tað. Endamálið er at geva teimum yngstu, sum júst hava fingið teir grundleggjandi førleikarnar á teirra ljóðføri, møguleikan fyri at vera við í samspæli. Orkestrið skal fyrst og fremst vera eitt venjingarorkestur fyri næmingarnar, men konsertir fara framyvir at vera ein natúrligur partur av virkseminum.

Hetta er ikki fyri at fara í kapping við onnur orkestur, men er gjørt í samráð við tey orkestur, sum longur eru at finna í býnum.




Lágtrýstið við Føroyar fer eystureftir og ein hátrýstryggur yvir Grønlandsfjørðinum verður yvir Føroyum fríggjamorgunin.




Eitt djúpt lágtrýst við Hvarvið fer spakuliga eystureftir og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum leygarnáttina.




**Hitalagið mált frá 4./10. kl 06[00]–5./10. kl 06[00]. Hitin í gjár: 9,0°C**
Minsti hiti máldur í oktober: **÷4,0°** Mesti hiti máldur í oktober: **18,4°**




Avfallið: 4,7 mm – **mált frá 4./10. kl 6[00]–5./10. kl 06[00]**
Avfallið higartil í oktober: 19,6 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷2 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 2 |
| Ammassalik | 1 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 15 |
| Tromsø | 12 |
| Bergen | 14 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 15 |
| Keypmannahavn | 16 |
| Helsinki | 12 |
| Moskva | 11 |
| Berlin | 18 |
| Warzawa | 21 |
| Kiev | 19 |
| Bukarest | 15 |
| Paris | 16 |
| Madrid | 24 |
| Róm | 21 |
| Malorca | 24 |
| Athen | – |
| Malta | 23 |
| Tunis | 22 |
| Beijing | 22 |
| New Dehli | 23 |
| Bangkok | 26 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | – |
| New York | 22 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 28 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 15 |

## Vestfalskyrrindi

5. okt.: Fyrra kvarter
6. okt.: Mánin longst frá jørðini

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/ Sundalagnum fp | sp | Vestmanna-sundi fp | sp | Mykines-firði fp | sp | Nólsoyar-firði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/ Svínoyarfirði fp | sp | Hvanna-sundi fp | sp | Fugloyar-firði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6. okt. | 00.47 | 13.19 | – | 12.19 | 00.02 | 12.34 | 02.47 | 15.19 | 03.47 | 16.19 | 11.34 | – | 10.34 | 23.10 | 01.02 | 13.34 | 02.02 | 14.34 | 00.32 | 13.04 | 01.47 | 14.19 |
| 7. okt. | 01.55 | 14.32 | 00.55 | 13.32 | 01.10 | 13.47 | 03.55 | 16.32 | 04.55 | 17.32 | 00.10 | 12.47 | 11.47 | – | 02.10 | 14.47 | 03.10 | 15.47 | 01.40 | 14.17 | 02.55 | 15.32 |
| 8. okt. | 03.10 | 15.43 | 02.10 | 14.43 | 02.25 | 14.58 | 05.10 | 17.43 | 06.10 | 18.43 | 01.25 | 13.58 | 00.25 | 12.58 | 03.25 | 15.58 | 04.25 | 16.58 | 02.55 | 15.28 | 04.10 | 16.43 |
| 9. okt. | 04.14 | 16.42 | 03.14 | 15.42 | 03.29 | 15.57 | 06.14 | 18.42 | 07.14 | 19.42 | 02.29 | 14.57 | 01.29 | 13.57 | 04.29 | 16.57 | 05.29 | 17.57 | 03.59 | 16.27 | 05.14 | 17.42 |

Kelda: Skipalistin 2000

sosialurin
Altíð fyrst við
www.sosialurin.fo